
Um tað bráðvakra og tað torskilta



Sosialurin og Sjónvarpið hava kent seg kallað at fara rættiliga í hernað ímóti Ólavsøkuframsýningini.

Ætlanin kann hava verið, at hetta skuldi snúgva seg um úrvalið og listaverkini, og hetta kundi so fört til, at framsýningin varð ummæld, listafólkunum til umhugsunar. Men soleiðis varð ikki. Ístaðin hendi nakað heilt annað. Líkt er til, at ein neisti onkursvegna hevur fest í ógvusligar innibyrgdar agressiónir. Undan kavi kemur ein beinleiðis andstygd ímóti nøkrum samfelagsborgarum, ið kallaðir verða »listaelitan«, »tey etableraðu«, »tey stóru og kendu«, ið vilja »svansa«, »dominera«, fremja »einaræði« og ongum øðrum sleppa framat og halda ungdóminum niðri, ið hótta kann teirra priviligeraðu støðu, ið byggir á »snobbarí, hátíðarligheit og leiting eftir støðu, ið byggir á »snobbarí, hátíðarligheit og leiting eftir »sál««. Við »kaldari hond... er nógv frálík list hildin uttan fyri framsýningina«. Í lesarabrøvum og viðtalum verða allar hugsandi illgitingar leitaðar fram – m.a. tann, at hugsað verður í fyrsta lagi um, hvør innsendarin er – »nevndin átti als ikki at vitað, hvør listamaðurin ella -kvinnan er, meðan dømt verður«. At geva nevndini, ið stílar fyri, høvi til at svara øllum hesum skuldsetingum, hevur sjálvsagt eingin stundir til, nú bálini loga.

Illgitanin av teirri sonevndu »elituni« er ódámlig. Einki av listafólkum okkara kundi funnið upp á at brúkt hetta heiti. Tað verður gjørt til nakað illgrunavert at duga sítt arbeiði og vera soleiðis fyri, at verið hepnast. Hetta erjú tann skinbarliga Jantelóg hjá Aksel Sandemose, ið kemur í gildi. Nú hildu vit annars, at hon var ikki rættiliga galdandi í Føroyum, hóast ein kundi ræðast fyri tí í so lítlum samfelag.

Listafelag Føroya, ið stílar fyri framsýningini, er eitt áhugafelag, ið hevur til endamál at stuðla føroyskari list. Hvør, sum vil, kann vera limur, limatalið er um 350. Hetta er sostatt ikki felagið hjá yrkislistafólkunum – tey hava sítt egna felag, Føroysk Myndlistafólk. Av teimum 5 nevndarlimunum í Listafelag Føroya plagar 1 at vera listafólk, tó, hetta stendur einki um í lógini. Felagið varð stovnað í 1941, í 1948 varð tann fyrsta Ólavsøkuframsýningin hildin, frá 1950 hevur hon verið á hvørjum ári. Felagið heitir á nøkur listafólk at stúla fyri Ólavsøkuframsýningini, hesi eru ikki tey somu á hvørjum ári, í ár vóru tað tey ungu listafólkini Anker Mortensen, Andrias Andreasen og Øssur Johannesen, sum saman við Guðrið Poulsen og Amariel Norðoy skipaðu fyri. Janus Kamban setti myndaskránna saman, sum hann hevur gjørt í so mong ár. Nú kann hvør sær gera sær metingar um hesi fólk umboða ta illgrunasomu »elituna«. Tey seinnu árini eru so mong verk send inn, at pláss hevur einans verið fyri helminginum. Eitt úrval verður gjørt, og sjálvsagt roynir nevndin at leggja dent á listarliga góðsku – og at fáa eina góða heild fram. Tað munnu nú vera eini 8 ár síðan eg sat í hesi framsýningarnevnd, men eg trúgvi ikki eina løtu, at tað kemur henni til hugs at halda »ungdommiligum royndum, stuttleika og sprelli« niðri við kaldari hond. Tvørturímóti – tað eg kenni til eru øll líka spent upp á, hvat kemur av nýggjum, hvørjar ungar gávur eru at síggja, og vanligt er, at tey ungu »debutera« á hesi framsýning.

Nú skilji eg, at ein orsøk til øsingina, er at ein ungur maður hevur ikki fingið síni verk við – eg havi ikki sæð tey og kann tí ikki meta um avgerðina, men eg gangi út frá, at blaðfólkini hava eitt grundarlag at meta á. Um so er, er tó einki løgið í tí, at meiningarnar kunnu vera ymiskar. So mikið veit eg, at tað at ein maður er ungur í árum, nýtist ikki at merkja tað sama sum at hann umboðar nakað nýtt og óspilt. Tann, sum í dag umboðar tað frískasta og upprunaligasta í føroyskari list, er 72 ára gamal.

Tað er jú altíð hugstoytt, tá ið ikki gongst, sum ein hevði ætlað – men er tað satt, at hetta er so stórur sorgarleikur? Í ítróttinum verður valt út – einans 11 mans kunnu spæla á landsliðnum. Onkur verður vónbrotin, tað er eyðsæð. Í einum orkestri kann einans eitt ávíst tal av tónleikarum vera. Tað er mong, ið ikki fáa ta útbúgving, tey ynskja sær – at skúlaskapur byggir á prøvtøkur, sum summi ikki klára, tykist vera vanliga viðurkent.

Innan júst myndlistina ert tú ikki so illa staddur. Fleiri framsýningarhøli eru her í Havn, ið tú kanst fáa við sera lagaligum ella ongum treytum, mangir smáir og stórir bólkar fyrireika framsýningar, eitt nú »Kontrast«, ið hevði framsýning í Listaskálanum nýliga. Tað stendur einum og hvørjum frítt at stovna ein nýggjan bólk ella sýna fram einsamallur. Nakað annað er, at summar av framsýningunum hava tað felags, at einki krav verður sett yvirhøvur, alt verður hongt upp í einum hurlivasa, vánaligt og gott hvørt um annað uttan fyrilit. Enntá kensluleysar fidusmyndir sleppa við. Tætt plagar tað at hanga, soleiðis at so nógv sum møguligt kann sleppa við.

Men soleiðis arbeiðir Listafelag Føroya bara ikki – tað má vera endamál felagsins at vera alternativ til hetta og leggja dent á góðsku. Í 1948 ráddi um hjá fealgnum at lívga øllum nálum, tær vóru ikki so mangar tá. Síðan hevur verið ríkur gróður, og uppgávan má nú vera at hækka støðið, at meta okkum einans við tað besta. Tað mátti einki forgjørt verið í, at hendan eina framsýningin hevði tað stavnhald.

Hesin ungi maðurin eigur at dríva á, mála og tekna, menna sítt sjálvsálit og síðan senda verk síni inn til Ólavsøkuframsýningina eina aðra ferð.

Ein megintrupulleiki tykist vera, at amatørar og yrkislistafólk sýna fram saman. Hetta fremsta eyðkenni hjá Ólavsøkuframsýningini er tilætlað. Tað vit vita um í øðrum londum eru amatørvirksemi og professionalitetur tveir ymiskir heimar – áhugamálini ganga hvørt sín veg. At amatørar og professionel sýna fram saman er rættiliga sjáldsamt, so sjáldsamt, at Ólavsøkuframsýningin er vorðin gitin. Einaferð fekk eg áheitan úr Finnlandi um at koma hagar at greiða frá hesum positiva fyribrigdi, at tað ber til at hava eitt listalív, ið ikki setur mark millum amatørar og professionel. Vit hava verið eitt sindur errin av hesum. Men kanska ber hetta ikki til longur – tað kann henda, at hetta fer í søguna, tað kann herferðin í Sjónvarpi og Sosiali kanska vera tekin um. Sjálvur haldi eg tað vera spell, um so verður.

Eg seðgi í áðni, at vit høvdu einki veruligt ummæli sæð. Hetta kann ikki vera rætt, vil onkur halda – hvat við blaðsíðu 6 í Sosialinum nr. 142? Tað er bara tað, at hasa greinina hava vit lisið so mangar ferðir áður, enntá við somu yvirskrift, »Nýggju klæði keisarans«, so hon sigur okkum einki nýtt, og tí fáa vit tíverri lítið gagn av henni. (Neyvan var tað hetta, H. C. Andersen ætlaði við sínum flogvituga ævintýri). Í Føroyum stóð greinin í Dagblaðnum fleiri ferðir í 1970-80-árunum. Men hon kemur fram við ávísum millumbilum víða hvar, í óseriøsum blóðum og tíðarritum, eins og søgurnar um Loch-Ness djórið og tann flúgvandi bordiskin.

Í 1920-30 árunum kom greinin regluliga í týskum og sovjettiskum blóðum og tíðarritum, hetta endaði við herferð hjá Stalin og Hitler móti nýggju listini, ið førdi til, at ein hópur av heimsins mest týðandi listafólki flýddi og búsetti seg í Amerika og Onglandi – burturúr hópinum kunnu vit nevna Bela Bartók, Thomas Mann og Oskar Kokoschka. Tað er jú soleiðis, at tá ið tú skalt taka støðu til nakað, ið er økent og sostatt mangan «óskiljandi fyri vanlig fólk«, so noyðist tú at hugsa sjálvstøugt, og tað er sum kunnugt sera vandamikið fyri einaræðið. Tí er listafólk vandamikil. Men latum okkum líta at høvuðsinnihaldinum í ummælinum í Sosialinum – próvførsluni.

»Máling oyst yvir lø[…]rift, við einstøkum tilvildarligum strikuskapilsum inn ímillum og svakliga samanblandaðum litum, so ein ikki ivast í, at fleiri av hesum fólkum høvdu havt gott av at fingið kannað eyguni... Tað sær út til, at høvuðsendamálið við hesi abstraktu listini er at ørkymla sum mest, so eingin skal kunna fáa nakað burturúr...«

Vit fáa ikki nógv at vita um, hvat Sosialurin heldur vera góða list, men onkur ábending er kortini, m.a. hesi orð, ið siga rættiliga nógv um grundsjónarmið skrivarans: »Og tað mest harmiliga av tí heila er, at fleiri av hesum góðu fólkum... kunnu bæði avmynda, lýsa og endurgeva bæði lutir, kenslur, stemningar og annað, men velja heldur at fara ein túr í mjørkan eftir fýrakantum, ið bert variera í liti um teir eru beinir, skeivir ella øvugtir. Farið ein túr í onkran barnagarð og finnið har tykkara javnlíkar – men kortini yvirmenn í sannari og hjartaligari list«. Aðrastaðni stendur »Sonn list... Vakrir litir og vøkur motiv – stutt sagt: List!«

Listafólkini skulu altso avmynda, lýsa og endurgeva, nýta vøkur motiv og vakrar litir. Her síggja vit ta stóru misskiljingina. Hetta er ikki, hevur ongantíð verrið og fer ongantíð at verða endamálið hjá listini. At vísa okkum tað vælkenda, tað vanabundna, tað ið ikki órógvar og tekur okkum av fótum, hava vit so mangar aðrar samfelagsstuðlar at taka sær av. Sum kunnugt er ein stórur undirhaldsídnaður, ið byggir á hetta, ein hópur av filmum, bókum, tíðarritum og blóðum hava einans hetta enda mál, og hjá okkum tykjast fjølmiðlarnir við fáum undantøkum hava at kalla einans ta uppgávuna í løtuni.

Hvat skal listin? Tað ber ikki til at greiða út í æsir, hvat hon skal. Hon er so rík og fjølbroytt og ymisk, at eitt heilt lív røkkur ikki til at kenna hana. Mangur hevur roynt at tilskila, hvat hon skal, men tað er altíð óhepnið og miseydnast vanliga. Eitt er víst – hon vil heldur tað óvissa enn tað trygga, hon skal vera ein avbjóðing, hon skal seta nýggjar spurningar og leiða okkum inn á ókendar, stundum vandamiklar leiðir. Skuldi uppskriftin hjá Sosialinum verðið brúkt, hevði listin ongan týdning havt, bøkur hjá eitt nú Victor Hugo og Charles Dickens høvdu ikki verið skrivaðar. Hetta eru megnar listaverk, ið hava ikki minni enn broytt heimin. Filmirnir hjá Chaplin, Bergmann og Bunuel høvdu ikki verið, vit høvdu ikki búð í teimum húsum, vit búgva í og nýtt tey klæði, vit ganga í. Tá ið kubisman kom fram sum myndlistarlig nýhugsa, tóktisthon samtíðarfólki nógv meira torskild, enn listin á Ólavsøkuframsýningini ger í dag. Men, sum danski listaummælarin Povl Henningsen tók til: »Ávirkanin hjá kubismuni var so ógvuliga stór, at um ein genta í dag fer inn í eina klædnabúð í Haparanda og velur sær ein summarkjóla, so standa Braque, Léger og Picasso ósjónligir undir liðini á henni og hjálpa henni við valinum«. Men einki steðgar – tá ið kubisman er komin til Haparanda, mega nýggir málarar taka nýggjar trupulleikar upp.

Tað kann vera ringt at skilja, at listin alla tíðina skal broytast. Hetta er so møðsamt. Hví kunnu vit ikki steðga og siga, at nú má vera sum er. Uttan mun til, hvussu nógvar greinir, vælmeinandi blaðmenn skriva um tað, kann hetta tó ikki broytast. Tað hevur verið roynt so mangan til fánýtis, tí broytingin er listini í holdi borin. Vit fáa einki gjørt við tað, tað er bara soleiðis, at góð listafólk velja altíð royna at fara um mark og royna torgongdar leiðir.

Nú høvdu vit júst góðtikið litríku landslagsmálningarnar hjá Ingálvi, vit høvdu vant okkum við teir – og so ferhann guð hjálpi mær at mála nakað heilt